

# Várskúlin

23. – 26. mars 2020

## Smátjóðir og framtíðar fyrisiting

STJÓRNARSKÚLIN
LANDSFYRISITINGIN

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Smátjóðir og framtíðar fyrisiting

Kom á Várskúlan í døgunum 23.-26. mars saman við altjóða serfrøðingum innan smátjóðir og framtíðafrøði og 10 øðrum serkønum undirvísarum og framløgufólki.

**4 dagar við serfrøði, góðari frálæru og framløgum**

- Smátjóðir
- Føroysk fyrisiting
- Risarák
- Framtíðafrøði/senariubygging
- ES og altjóða politikkur
- Politikksmíð
- Avbjóðingar og møguleikar hjá smátjóðum

5 ECTS kunnu vinnast

## Um Várskúlan

Føroyar eru ein smátjóð í einum heimssamfelagi, ið alsamt verður avbjóðað og ávirkað av eitt nú risarákum og tvørligum trupulleikum. Trýstið á okkum at arbeiða meira framtíðargrundað gert alsamt størri, og føroyska fyrisitingin møtir avbjóðingum og hevur møguleikar. Á hesum Várskúlanum seta og viðgera vit stórar spurningar:

Hvussu skal føroyska samfelagið brynja seg til framtíðina? Hvussu arbeiða vit við óvissu? Hvat eyðkennir eina smátjóð? Hvussu virka vit í altjóða framtíðar politikki, og hvussu sær framtíðar politikksmíð út? Hvussu arbeiða vit við risarákum og senariubygging?

Várskúlin er eitt samstarv millum Stjórnarskúlan og Fróðskaparsetrið og er ætlaður starvsfólki í landsfyrisitingini, lesandi og øðrum áhugaðum. Stjórnarskúlin er felags førleikamenningareindin í landsfyrisitingini.



## Tveir serfrøðingar í smátjóðum og framtíðafrøði:



### Godfrey Baldacchino

Godfrey Baldacchino er professari í sosiologi á Lærda Háskúlanum á Malta. Hann er serfrøðingur í viðurskiftum hjá smástjóðum. Hann  hevur í nógv ár granskað smásamfeløg og teirra kor og avbjóðingar. Godfrey hevur skrivað fleiri bøkur og greinar um viðurskifti hjá smátjóðum. Hann er nógv umbiðin fyrilestrarhaldari. Hann hevur áður verið í Føroyum og undirvíst um smátjóðir.



### Bogi Eliasen

Bogi arbeiðir sum ráðgevi og framtíða-granskari, knýttur at viðurkenda Instituttet for Fremtidsforskning í Keypmannahavn. Bogi er útbúgvin stjórnmálafrøðingur. Hann hevur seinastu árini arbeitt nógv við heilsu og politikksmíði við framtíða-frøðiligum arbeiðshátti. Bogi ráðgevur m.a. um átøk í mun til framtíðar av-bjóðingar. Hansara tilgongd er tvørfaklig.

## Onnur framløgufólk

Malan Johansen, Landsbankin, Árni Johan Petersen, Hallbera West, Bárður Larsen og Heini í Skorini, Fróðskaparsetur Føroya, Jan Ziskason, Føroya Tele, Sjúrður Rasmussen og Nella Festirstein, Løgmansskrivstovan, Andras Marr Poulsen, Fiskimálaráðið og Kate Sanderson, Uttanríkistænastan.

## Kunning og umsókn

Trýst her: **www.setur.fo** og fá meira kunning um Várskúlan. Umsókn við stuttum C.V. skal sendast til **karinD@setur.fo**. Umsóknarfreistin er 3. mars. Umsøkjarar fáa svar í seinasta lagi 6. mars. Allir luttakarar fáa skeiðsprógv. Luttakarar, sum fara til próvtøku, fáa eisini ECTS prógv.

Kostnaðurin er 4.500 kr. Við í prísinum er skeiðstilfar, miðmálar allar dagarnar, kaffi/te v.m.